# Trølla-Pætur og omman rokkaðu í Miðlahúsinum

**Leygardagin vitjaðu Trølla-Pætur og omman í Miðlahúsinum í Vágsbotni. Tey bæði rokkaðu og undirhildu fyri allar pengarnar, og tey mongu børnini, sum vóru komin at hitta tey bæði, hugnaðu sær óført**

TRØLLAVITJAN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*
*Myndir: Jan Müller og Terji Nielsen*








Er tað nakar, sum kann fanga føroysku børnini, so eru tað tey bæði Trølla-Pætur og omman. Hetta sást eisini aftur, tá ið tey bæði leygardagin skuldu koma á vitjan í Miðlahúsinum í Vágsbotni. Hølið var stúgvandi fult av børnum og foreldrum, ommum og abbum.

### Rokkur og Nósi

Tiltakið í Miðlahúsinum byrjaði við, at tey bæði Steintór Rasmussen og Arnfríð Lützen spældu og sungu nakrar sangir av fløgunum hjá Kulum Røtum. Hetta vóru sangir, sum tey flestu av børnunum kendu, og fleiri teirra høvdu eisini hug at syngja við.

Tá ið tey bæði høvdu spælt eina løtu, komu Trølla-Pætur og omman bráddliga brestandi oman gjøgnum trappurnar, og frøðin á børnunum var stór. Tey bæði løgdu bragdliga fyri og rokkaðu við fullari megi, og børnini sluppu at hoyra nakrar heilt nýggjar sangir, sum tey bæði trøllini hava gjørt.

Tá ið Trølla-Pætur og omman, sum í sambandi við vitjanina í Havn, høvdu keypt fleiri av jólagávunum, ið tey skulu keypa, vóru um at verða liðug, kom eisini Nósi á vitjan. Stór var gleðin á Trølla-Pæturi og ommuni, tá ið tey sóu Nósa, og so var hildið á eina løtu afturat.





### Stór undirtøka til kappingina

Tiltakið í Miðlahúsinum var eisini í sambandi við, at Sosialurin í eina tíð hevur havt eina kapping við Trølla-Pætur, Kulum Røtum og øðrum koyrandi, og leygardagin vóru vinnararnir í kappingini funnir.

Onkur heppin vinnari var enntá hjástaddur í Miðla-húsinum og kundi tískil sjálvur koma upp at taka ímóti vinninginum hjá sær.

Høvuðsvinningurin var ein kul ferð fyri tvey vaksin og tvey børn á tí kula rutunetinum hjá Atlantsflog, og tann vinnarin dróg sjálvur stjórin í Atlantsflog, Magni Arge. Vinnari gjørdist Barbara Hentze í Havn.

## Vinnararnir í kappingini:

***Høvuðsvinningur:***
***Ein kul ferð fyri tvey vaksin og tvey børn á rutunetinum hjá Atlantic Airways:***
Barbara Hentze, Villingadalsvegur 15, 100 Tórshavn

***Filmur - jólini hjá Trølla-Pætur:***
Marna J. Klein, Mørkin 27, Fuglafjørður
Sára Olsen, 490 Strendur
Gunnrið Poulsen, Dánjalstrøð 13, 100 Tórshavn
Birita Dal-Christiansen, Sleipnisgøta 2B, 100 Tórshavn
Pól Ási Hovgaard, Fjalsgøta 42, 100 Tórshavn
Steinar P. Jacobsen, 335 Leynar
Susan Johansen, Miðvágur
Astrid Myrdahl Vestergaard, Smærugøta 7, Tórshavn
Jutta Nielsen, Heygalíð 15, Vestmanna
Johann Fløtt, 470 Eiði

***Kular Røtur - fløga:***
Magnus Rúnason Debes, Tjørnuvík
A. Mortensen, Traðagøta 7, Tórshavn
Ragnar K. Danielsen, Húsanesvegur, Miðvágur
Poula í Frammistovu, 740 Hvannasund
Fríða Weihe, Lynggøta 7, 100 Tórshavn
Hakim Tóri Nattestad, Hvalba
Hanna E. Jacobsen, Skálabotn
Pætur J. Petersen, Skálavík
Astrid Myrdal Vestergaard, Smærugøta 7, Tórshavn
Marita B. Atladóttir, Vestmanna
Magni Árting Mørk, Viðargøta 31, Argir
Mortan Árting Mørk, Viðargøta 31, Argir

***Kular Røtur - bók:***
Elsa M. Gullaksen, Bøgøta 17, Kollafjørður
Jóhanna Midjord, Støðlatún 2, Argir
Rúna Poulsen, Grønalíð 10, Tórshavn
Rebekka Behrens, J. H. Schrøtersgøta 4, Tórshavn
Fríða Weihe, Lynggøta 7, 100 Tórshavn
Bogi Apol, í Svanga 4, Tórshavn
Olivia Sunadóttir, í Húsi, Miðvágur
Suffía Danielsen, Tórsbyrgi 24, Tórshavn
Bjarti Samson Vang, Heygsgerði 16, Tórshavn
Vár og Lív Bech Árting, Kongsgil 3, Tórshavn
Ragnar Rasmussen, Sjúrðargøta 7, Tórshavn